# Ferðasíðan

62°N

# VIKUSKIFTISFERÐ
# TIL KEYPMANNAHAVN

Fríggjadag - Mánadag
Hósdag - Sunnudag

**Vit halda okkum kenna Keypmannahavn so væl, men hevur tú veruliga upplivað Keypmannahavn sum ferðafólk ?**
**Hví ikki vitja danska høvuðsstaðin við forvitni, tí Keypmannahavn hevur nógv annað at bjóða enn Tivoli og vælkendu gongugøtuna "Strøget".**

Uppliva og njót Keypmannahavn á ein øðrvísi hátt! Far t.d. á sightseeing við dupultdekkara ella kanalrundferð við báti.
Er áhugin til list og mentan, er hópur av listaframsýningum og søvnum at vitja.
Innan sjónleikaheimin stendur Keypmannahavn ikki aftanfyri nakran, og ein vitjan á "Det kongelige Teater" er ein uppliving fyri lívið.
Tað nýmótans og vakra operahúsið hevur avgjørt uppiborið, at tú leggur leiðina framvið. Framførslurnar eru í heimsklassa og taka teg við inn í annan heim.
Býurin hevur eisini nógvar hugnaligar og góðar matstovur/caféir og, men ikki minst, eru innkeypsmøguleikarnir av teim bestu.
Far inn á www.visitcopenhagen.dk og les meira um, hvat Keypmannahavn hevur at bjóða.







**Íroknað prísin er:**

Flogferð Vágar – Keypmannahavn t/r, ókeypis drykkivørur og matur umborð á Atlantic Airways, ferðaavgjøld og gisting á hotelli í 3 nætur v/ morgunmati.

Prísurin er treytaður av, at gott pláss er á flogfarinum, tá bílagt verður.

**Kr 3.820,-**
fyri hvønn í dupultrúmi
Eyka fyri einakamar kr. 1025,-
Galdandi til 31.12.07

## Hotel Du Nord***

Hotel Du Nord er eitt sjarmerandi og hugnaligt hotel, sum liggur í hjartanum í Keypmannahavn, bert fáar minuttir frá høvuðsjarnbreytarstøðini.
Hotellið, ið hevur 65 kømur, bleiv bygt í 1892, men er nýliga endurnýggjað úr kjallara í loft.
Kømrini eru hugnalig og innrættað í klassiskum stíli. Allir hentleikar eru, so sum fylgisveinasjónvarp, internet samband, stik til PC og fønari. Eisini er møguligt at gera sær the og kaffi.
Baðirúmini eru ljós og rúmlig og eru øll við baðikari.
Hugnaliga, ljósa morgunmatarstovan bjóðar skandinaviska morgunmatarbuffét.

Hotellið hevur eina roykfría hædd.
Parkeringsviðurskiftini eru góð og sjónbandaeftirlit er á hotel umráðnum.

Les meira á www.hoteldunord.dk



**Kr 4.430,-**
fyri hvønn í dupultrúmi
Eyka fyri einakamar kr. 1350,-
Galdandi frá 31.10 - 31.12.07

## Copenhagen Island

Copenhagen Island varð bygt í 2006 og er eitt hotel í serklassa.
Nýmótans kvalitetur merkir hotellið. Tann ótrúliga byggilistin og teir mongu marglætis hentleikarnir gera hotellið unikt.
Hotellið hevur 326 kømur, ið øll hava fønara, air condition, tráðleyst internet samband, flatskerm, minibar og baðirúm við baðikari.
Roykjara og ikki-roykjararúm.
Á ovastu hædd er fittnes sentur við ótrúliga vøkrum útsýni yvir havnina.
Eisini er sauna, dampbað og ókeypis atgongd til fittness sentrið. The Harbour er stóra, vakra matstovan, ið liggur á ovastu hædd og hevur einastandandi útsýnið yvir havnina.

Les meira á www.copenhagenisland.dk.

*Fyrvarni verður tikið fyri prentvillum og príshækkingum

**62°N travel verður á Lívstílsstevnunini 07**

ATLANTIC AIRWAYS

62°N

**Hoydalsvegur 17 • FO-100 Tórshavn**
**Tel: 34 00 00 • Fax: 34 00 11 • booking@62n.fo**
**www.62n.fo**

Opið: Mán-frí 08.00-17.00
Leyg 09.00-13.00